# TAÐ HENDIR …

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## NÚ VERÐUR STÓRA ROYNDIN

Birmingham hevur tikið mong á bóli í einsku landskappingini í ár. Liðið hevur fingið óvæntað góð úrslit, og seinastu vikurnar hevur tað gingið framúr væl. Leygardagin sleppur Birmingham veruliga at royna seg, tá ið meistararnir úr Manchester United koma á vitjan.

**BIRMINGHAM-MANCHESTER UNITED**
Canal+ Sport2
Leygardagin 9/1 kl. 17.30



## UMSTRÍDDUR FILMUR Á DVD

Ein av mest umstríddu filmunum í fjør var Antichrist, sum Lars Von Trier leikstjórnaði. Filmurin fekk misjøvn ummæli, men hann skapti røring í filmsumhvørvi, tí hann er provokerandi og ógvusligur á ymsan hátt. Nú er filmurin at fáast sum dvd.

**ANTICHRIST**
dvd



## VIÐHVØRT MÁST TÚ LÚGVA

Sometimes truth needs á lie kallast nýggja fløgan hjá Brandi Enni, sum júst er komin út í Føroyum. Seinni í hesum mánaðinum verður hon eisini tøk kring norðurlond. Brandur Enni hevur triðju og seinastu útgávukonsertina í Føroyum í Norðurlandahúsinum mikukvøldið. Gestur hjá Brandi verður Lív Næs. Afturat sær hevur Brandur ein vælmannaðan og –spælandi bólk.

**BRANDUR ENNI**
Útgávukonsert
Norðurlandahúsið
mikukvøldið 13/1 kl. 19.30



## 13. KVØLDSDANSUR

Vit eru í tradiotionellari dansutíð í Føroyum, og leygarkvøldið skipar Tøkum lætt fyri 13. Kvøldsdansi í Sjónleikarhúsinum í Havn. So er bara at finna stevið eftir jólu- og nýggjársferiuna og fáa sveittan framaftur.

**13. KVØLDSDANSUR**
Sjónleikarhúsið
í Havn
Leygarkvøldið
9/1 kl. 22




## NÝTT VIÐ WALLANDER

Síðani fyrst í 1990'unum hevur Henning Mankell skrivað spenningssøgur um løgreglumannin Kurt Wallander. Røðin telist millum tær væl umtóktu norðurlendsku krimirøðirnar, og fleiri av bókunum eru gjørdar til film – eisini á enskum máli. Í nýggju bókini kemur Wallander upp í viðurskifti, sum hava við kalda kríggið og hernaðarligar loynidómar at gera.

**HENNING MANKELL**
Den Urolige Mand




## SÚKKLU-MEISTARIN AV MAN

Hann hevur verið við í Oyggjaleikum og vunnið stórt, men í dag hevur hann ikki stundir til Oyggjaleikir, tí hann er við í súkklukappingum á hægsta altjóða stigi. Hann er ein av mest virdu ítróttarmonnunum í Bretlandi, og hann er milum heimsins sterkastu súkklarar. Í hesari bókini greiðir Mark Cavendish, sum er ættaður av Isle of Man, um seg sjálvan sum persón og ítróttarmann.

**MARK CAVENDISH**
Boy Racer



## ÁRLIG NÝGGJÁRSKONSERT

So er árliga Nýggjárskonsertin aftur á skránni. Konsertin verður fyriskipað í samstarvi millum Føroya Symfoniorkestur, Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Til ber sjálvandi at møta í Norðurlandahúsinum og fáa eitt serligt konsertupplivilsi, men eisini er møguleiki at uppliva konsertina í Kringvarpinum.

**NÝGGJÁRSKONSERTIN**
Norðurlandahúsið
leygarkvøldið 9/1 kl. 19.30